# Fundafrásøgn frá felags foreldrafundi 27.august 2025

Fyri innskúlini í Lítlaskúla

Gunvør kunnaði fyri um ymiskt:

**Vikuætlan**

Skal lesast hvønn dag. Liggur á heimasíðu skúlans. Spyrjið endiliga læraran (umvegis sms), um tit ivast í onkrum.

Fyrireikið barnið heimanífrá, so tey vita, hvat fer at henda í skúlanum. Um tað er eitthvørt, sum barnið ikki hevur so góðan hug á, so er gott at práta um hetta, soleiðis at barnið skilur, hví arbeiðast skal við hesum ymiska.

Næmingarnir skulu jú læra at lesa, skriva, rokna og vera góðir floksvinir. Tey skulu læra at gera okkum ómak, at lurta eftir felagsboðum og at gera eftir boðum frá teim vaksnu uttan hóvasták.

**Tímatalvan**

Liggur somuleiðis á heimasíðu skúlans. Har finna tit eisini telefonnummur hjá lærarum og námsfrøðingum.

**Stundvísi**

Vani býtur best, sigur gamalt orðatak. Gott um tit kunnu geva børnum til vana, at møta stundisliga. Lærið barn tykkara at taka taskuna inn í flokkin beinaveg, sum tey koma. Fleiri lata taskuna hanga í gongini, og fara eftir henni tá frálæra skal byrja. Hetta gevur nógv óneyðugt órógv.

Vit í Lítlaskúla stremba eftir altíð at byrja og enda undirvísingina stundisliga.

Um tit koma ov seint, mugu tit læra barnið at koma stillisliga inn í flokkin, tí tá er undirvísingin longu byrja, og nógvir næmingar eru byrja at arbeiða og harvið at læra.

**Arbeiðslag**

Tosið við barnið um at verða til reiðar, tá tímin byrjar.  Eitt gott arbeiðslag er avgerðani fyri læring, og fyri góðan trivna í flokkinum.

Lagt varð aftrat, at børn skulu ikki hava leikur við í skúla. Hetta er alt ov órógvandi fyri arbeiðslagið í tímunum.

Í skrivandi stund leggi eg aftrat, at langar “falskar” negl og sminka ikki skal við í skúla. Tað órógvar barnið og felagsskapin alt ov illa.

**Pennahúsið – amboð**

Latið tað gerast ein vani, at kanna pennahúsið hvønn dag. Onki er so rotið sum, at standa og mangla viskileður, blýant ella linjual tá tað skal brúkast. So skal mann spyrja hini í flokkinum um at læna, og tað kann fyri summi vera mega flóvisligt.

Latið tað gerast ein vani, at blýantar eru spískaðir heimanífrá, so tíð ikki skal brúkast uppá hetta í tímanum. Børn, sum skulu spíska blýantar í tímunum, órógva ofta hini í flokkinum, tí tey halda, at tað ber til at práta við hini, tá spískað verður.

**Útiskúli – vatntættir skógvar**

Væl ílatin børn, halda at útiskúlin er supergóður. Tey, sum eru køld og vát, halda at útiskúli er rotið og keðiligt.

Gott í tykkum góðu foreldur, at tit heimanífrá syrgja fyri, at barnið hevur klæði sum hóska til veðrið. Vatntættir skógvar eru nógv betri fyri føturnar at ganga í, heldur enn gummistivlar - hóast hesir eru so deiliga nemmir at ganga í.

Harumframt mugu tit eisini tosa við tey um týdningin av at lata seg í góðu klæðini. Vit skulu á hvørjum útiskúladegi brúka tíð og orku uppá at yvirtala børnini um at lata seg nóg væl í. Hetta er tíð og orka, sum kann brúkast nógv betri.

**Lesing**

Tá barn tykkara dugir at lesa, er sera umráðandi, at barnið lesur heima hvønn dag. Hyggið í vikuætlanin, hvussu leingi lesast skal.

Um barnið hevur nógva mótstøðu mótvegis lesing, kunnið tá flokslæraran, soleiðis ein møgulig loysn/kanning kann finnast/gerast.

**Kunningarfundur fyri foreldrum í innskúling verður 17.septembur kl.18.30 - 20.00.**

Tá fáa tit kunning um bókatilfar, sum arbeitt verður við. Vit umrøða spæli/vinabólkar, føðingardagar og foreldraumboð skulu veljast.

Vit síggjast!

**SSP. Samstarv - um børnini - millum skúla, socialar mynduleikar og politi**

Súsanna í Króki, ráðgevi hjá SSP:

Endamálið við **Knýta bond** er at styrkja foreldrasamstarvið, og gera felags leiðreglur um skíggjanýtslu. Sum er fyribyrgjandi móti bólkatrýsti.

SSP var í Lítlaskúla í apríl 2025 – men av ymsum orsøkum vóru nógv foreldur, sum ikki kundu luttaka. Foreldrini, sum vóru á fundinum í apríl ynsktu, at hesin fundur varð hildin aftur við skúlabyrjan í aug. 2025.

Spøl, sum næmingar spæla:

- Minecraft – tey flestu spæla offline, og tað er gott, tí í offline-versiónini er ongin chat-funktión
- Roblox - verið varin, tí tað eru so nógv spøl í Roblox, og tey hava ymisk aldursmark
- Fortnite
- Youtube - nógv nevndu youtube-kids
- Goat-simulator – 12 ára aldursmark
- Cover-star – tiktok til børn, men verið sera varin, tí aldursmarkið hækkar allatíð.

Bogi Augustinussen, Føroya Politi:

Ávarar ímóti skakandi søgum.. Men Politiið metir, at tað er neyðugt og tørvur á at upplýsa foreldur um vandarnar, sum gerast alsamt fleiri umframt at børn sum verða útsett fyri keðiligum/skakandi hendingum gerast yngri.

NCMEC:

Skipan, sum “fangar”, tá ólógligar myndir á netinum. Skipanin lokaliserar hvørjum landið, málið hoyrir til, so sendir automatiskt.

1200 fráboðanir í tíðarskeiðinum 2022 til aug 2025.

Verið varin við Snapchat. Børn kunnu vera í Snapchat-bólkum, har tey ikki vita, hvussu nógv eru í bólkinum ella hvussu gomul bólkalimirnir eru.

Børn kunnu koma til at senda eina ósømiliga mynd, sum kann kategoriserast sum barnaporno. Í slíkum førum kann barnið vera dømt, og hendingin kemur at standa í revsiváttanini - sum hevur við sær, at tað ikki verður møguligt at arbeiða við børnum í framtíðini.

Grooming:

Vaksin, sum geva seg út fyri at vera børn, og sum kontakta børn við tí fyri eyga at fáa eina nakinmynd av barninum.

Tað gongur sera skjótt. Skjótasta málið í FO er 17 minuttir. Frá fyrstu kontaktina til at barnið hevur sent eina nakna mynd av sær sjálvum.

Tey yngstu børnini eru 10 ára gomul, sum FO politi veit um. Í DK eru børn niður í 7 ár útsett fyri hesum.

Fleiri børn seta orð á, at tey eru von við at síggja nakinmyndir.

Jú fyrr barnið fær snildfon, jú fyrr skulu vit sum foreldur greiða børnunum frá vandum á netinum.

Góð ráð:

- Bíða sum longst við at geva børnum snildfon
- Fylgja við væl við, hvat børnini gera á netinum

Familylink

TP-link

Takk fyri góða uppmøting og góð kjak góðu foreldur!